# Celtic í trupulleikum

Tað er líkt til, at Celtic ikki fer at taka lut í bólkaspælinum í Champions League komandi árið. Á heimavølli í gjár tapti liðið 1-0 móti Dynamo Moskva. – Eg eri sera vónbrotin, men framvegis optimistiskur. Vit skulu hava trúnna á, at tað letur seg gera, sigur Tony Mowbray, venjari hjá Celtic, við skotskar miðlar. Kokorin skeyt einasta málið hjá Dynamo Moskva.



# Vieira á veg til Arsenal

Arsené Wenger, venjari hjá Arsenal, sær fegin, at Patrick Vieira kemur aftur til felagið. Tað avdúka enskar miðlar í dag. Miðvallarin hevur sjálvur sýnt áhuga fyri at koma aftur til felagið, sum hann umboðaði frá 1996 til 2005. Tá skifti hann til Juventus, og seinni til Inter, men hann hevur ongantíð fingið sítt gjøgnumbrot í italskum fótbólti. Patrick Vieira er 33 ára gamalur.

Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu
Myndir: Álvur Haraldsen



# Hetta er ein dreymur

Ungi álopsleikarin hjá Víkingi, Finnur Justinussen, var stórliga fegin um úrslitið hjá felagnum, nú hann á fyrsta ári á besta liðnum gjørdist steypavinnari og fekk eitt mál.

- Hetta er nakað eg havi droymt um leingi, so hetta er øgiliga deiligt. Hetta er størsti dysturin eg nakrantíð havi spælt og tí er tað sjálvandi deiligt at vinna. Og so er tað sjálvandi gott, at vit nú sleppa í Evropa at spæla, men árið er ikki bjargað enn. Tí vit ætla okkum at vera millum medaljurnar í FM-stríðnum, tá tað kemur so langt, staðfesti Finnur Justinussen, sum sjálvur gjørdi eitt mál í dystinum.

# Okkara spæl vann

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, var fegin um sítt fyrsta steyp við Víkingi.

- Hetta er øgiliga gott, og tað stóð nógv á til endans. Nervar komu eisini inn, og so skoraðu teir eisini. Men sum heilt haldi eg, at vit onkursvegna spældu hesa finaluna rætt við at spæla okkara spæl. Vit fóru eftir teimum alla tíðina og tað hevur alla tíðina verið ætlanin, segði venjarin beint eftir finaluna.

Hann helt eisini, at orsøkin til, at tað var so lítið um EB/Streym størsta partin av dystinum var, at spælið var í so disiplinerað.

# Fult uppiborið

- Atmosferan var fantastisk allan dystin, og eg haldi, at hetta var fult uppiborið hjá okkum. Men intensiteturin var øgiliga høgur allan dystin, og tað kendist sum at hava spælt tveir dystir eftir fyrra hálvleik, segði Atli Gregersen, tá dómarin hevði floytað av.

Hann vísti eisini á, at tá so nógvir áskoðarar eru til ein dyst, so kennir mann onkursvegna, hvønn veg tað ber.

- Í løtum hoyrdu vit bara Víkingar og so hoyrdu vit bara, at tey róptu á EB/Streym, so mann kann róliga siga, at áskoðararnir høvdu nógv at siga í dag.

Hann vísir tó á, at málini teir fingu ímóti sær, er nakað, ið harmar hann eitt sindur.

- Tað er keðiligt, hvussu teir fáa málini, og eg hugsi eitt sindur um tað. Men beint nú hevur tað ikki so nógv at siga, tí vit eru steypavinnarar!, staðfesti Atli Gregersen.

# Venjarar árið út

Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, vildi fyrst og fremst rósa felagsliðnum fyri eitt gott avrik í gjár, men spurdur um venjararnar var hann meiri spakur.

- Hetta er sjálvandi ikki tað vit ætlaðu, men vit vísa at vit eru í toppinum, tá vit eru í finaluni trý ár á rað. Um venjararnar havi eg onga viðmerking, men teir hava sáttmála fyri restina av árinum, og so taka vit tað harfrá, staðfesti formaðurin eftir tapið.

Formaðurin vísti eisini á, at menn løgdu nokk fyri dagin, men at tað var okkurt smávegis, ið manglaði.

# Ov nógvar uppgávur

Hóast Hans Pauli var eitt sindur vónbrotin, so var hann ikki so keddur av úrslitinum í dag.

- Hetta er ikki so heilt galið. Tað er sjálvandi altíð keðiligt at tapa, og serliga, tá tað er eina finala, men eg haldi tað var uppiborið hjá teimum, segði Hans Pauli Samuelsen.

Hann vísti tó á, at hann kendi, at tað vóru í so nógvar uppgávur, hvør leikari skuldi loysa, og tí var trupult at fáa so øgiliga nógv spæl.

Um Egil á Bø var hann tó ivaleysur.

- Eg haldi ikki, at tað hevur merkt liðið. Vit hava verið saman í dag, og hava ikki tosað um Egil, so eg merki ikki, at tað hevði nakað at siga. Vit royna at hyggja meira frameftir, segði hann eftir tapið ímóti Víkingi.

# Tað skuldi ikki verða

Sigrfríður Clementsen var rættiliga vónbrotin eftir dystin, men hann metir ikki, at tað, sum hevur verið kring Egil á Bø serliga hevði nakað at siga.

- Vit ætlaðu sjálvandi at vinna, og høvdu sett nøsina upp ímóti tí, og eg haldi ikki, at tað hevði nakað at siga, at tað stóra er at fara eftir við Egili á Bø. Eg setti liðið við teimum leikarunum, sum eg ætlaði, og tá menninir koma á vøllin, tá haldi eg ikki, at nakar hugsar um tað, segði venjarin hjá EB/Streymi.

Hann greiddi eisini frá, at árið ikki hevur verið eins gott og í fjør, men at vónirnar til komandi tíðir ikki eru so galnar.



